# Størri úrval av mati


Rúni í Lágabø gleðir seg til at fáa nýggjar avbjóðingar í køkinum, tá nýggi Smyril fer í sigling


Hovmeistarin Frans Gregoriussen hevur meir enn 20 ára royndir við catering frá Norrønu, so hann er væl fyrireikaður uppá nýggja Smyril

Teir báðir Frans Gregoriussen, hovmeistari, og Rúni í Lágabø 2. kokkur standa fyri matinum hendan túrin. Til døgurða borðreiddu teir við oksasteik, og til náttúra stóð grýturættur á matarlepanum. Hartil er smyrjibreyð at fáa alla tíðina.

Umstøðurnar at matgera umborð á gamla Smyrli eru avmarkaðar, men heitan mat gera kokkarnir kortini tvær ferðir um dagin, bæði til ferðafólk og manning. Til ferðafólkini gera teir vanligan mat, sum eisini útlendingar kennast við, meðan manningin ofta fær føroyskan mat so sum ræstan fisk, knettir, kjálkar o.a. Talið á døgurðum, sum verða seldir ferðafólkunum, kann liggja frá 10 upp til 100 alt eftir, hvussu veðrið er, og hvussu illa skipið rullar.

Rúni og Frans eru serliga spentir uppá góðu arbeiðsumstøðurnar, teir fáa umborð á nýggja Smyrli. Hetta merkir millum annað, at ætlanin er at geva ferðafólkunum fleiri heitar rættir at velja ímillum. Ì heila tiki vænta teir báðir, at eftirspurningurin eftir mati fer at verða munandi størri, tí sum skilst, fer nýggja skipið nærum ikki at rulla.

Á brúnni:

# Kann ikki samanlíknast


Hesa løtuna er skiparin í skjúrtu, men fyri tað mesta noyðist hann í oljuklæði, tá hann skal út á síðudekkið at manerera gamla Smyril móti kei

Erland Mørkøre er skipari hendan túrin við gamla Smyrli. Hann hevur silgt á hesi farleiðini síðani 1984, fyri tað mesta sum yvirstýrimaður. Erland heldur, at verður nýggi Smyril líka góður sum hesin, skal man ikki lata illa at - men hann skuldi helst verðið betri, tí hann er skraddaraseymaður til júst hesa farleiðina.

### Innilokað brúgv

Erland væntar, at ein av størstu broytingunum á brúnni verður, at tú ikki verður noyddur at fara út um á síðudekki at manerera skipið móti kei, tí á nýggja Smyrli er øll brúgvin innilokað. Meðan skipið legði at á Krambatanga hendan túrin, gekk skiparin í oljuklæðum, tí veðrið var so illfýsið.

Sjálvt um nýggja skipið verður munandi størri enn tað gamla, væntar Erlandi ikki, at tað fer at geva trupulleikar við at leggja at.

- Nýggi Smyril hevur so mikið góða maskinorku, at tað verður ongin trupulleiki. Tekniskt er hann eisini so væl útgjørdur á brúnni, at hann alt annað líka, má verða góður at manerera við, heldur Erland og leggur afturat, at sjálvt um gamli Smyril er sera góður at manerera, má ásannast, at tíðin er farin frá honum.

### Flest góðir túrar

Spurdur um hann minnist onkrar serliga buldrutan túr við gamla Smyrli, sigur Erland, at tað munnu tað nokk hava verið, men at teir góðu túrarnir hava verið nógv fleiri.

- Onkur heldur ivaleyst, at hesin túrurin hevur verið ringur, men soleiðis komi eg ikki at minnast hann. Nakað av vindi var suðureftir, men seinkingin stóðst serliga av, at tað tók so langa tíð at lasta skipið. Vit hava fult skip báðar vegir henda túrin, og arbeiðsumstøðurnar at lasta eru ikki av teimum bestu. Í so máta kann hetta skipið als ikki samanlíknast við tað nýggja, sum er 45 m longri. Og tað fer at geva teimum á dekkinum munandi betri arbeiðsumstøður, sigur Erland.